## Malsom til Íslands

Sam Malsom er ikki longur partur av besta manshópinum hjá B36. Onglendingurin og árstalsfelagið hava í sátt og semju gjørt av at siga upp sáttmálan. Orsøkin er, at Sam Malsom nú skal flyta til Íslands, har hann skal spæla fyri Þrótt.
Heimasíðan hjá B36 skrivar, at Sam Malsom hevur hug at royna aðrar avbjóðingar eftir eitt frálíkt ár í Føroyum.



©Álvur Haraldsen

## Gongur framá við skýlinum

Heimasíðan hjá AB skrivar, at arbeiðið við at gera áskoðaraskýlið á Argjum gongur so líðandi framá. Tað mesta av grundini er stoypt, og menn frá Búsetur eru í holt við at seta elementini, sum skulu bera sitiplássunum, upp. Í fyrstu atløgu seta teir bara elementir yvir til miðjuna, áðrenn tað skal aftur skal stoypast, er at lesa á heimasíðuni hjá AB.

# sentimetrar



Hjólamenn. Men enn er bara ein triðingur av samlaða kilometratalinum avgreiddur, og lagt er tí upp til tríggja spennandi dagar – fyrst í Sandoynni í dag, síðani í Suðuroynni í morgin og at enda í Streymoynni sunnudagin.

**Á lutfalsliga javna og slætta Eysturoyarteininum gjørdist tað eitt stórt felt við 13 súkklarum, ið bleiv partur av stóra endaspurtinum, ið tó endaði við, at teir tríggir favorittarnir tóku trý tey fremstu plássini**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Súkkla á Sandi

**Í dag er aftur einkultstartur á skránni, tá teir 25-26 súkklararnir fara at kappast á einum 27 kilometra longum teini heima á Sandi**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast fremstu súkklararnir vóru sera javnir í einkultstartinum í Klaskvík mikukvøldið, er ikki víst, at so verður í dag, tá einkultstartur er á skránni heima á Sandi. Fyrst og fremst, tí talan er um ein væl longri tein, 27 kilometrar, ið kann geva størri sveiggj í tíðunum, enn teir átta kilometrarnir í Klaksvík.

Ikki er óhugsandi, at oddafiskurin í kappingini, danski A-súkklarin, Troels Toftager Nielsen, av álvara fer at spæla við vøddunum. Hann er kendur sum ein sera sterkur einkultstartari í donsku kappingunum, og hevur frammanundan verið og hugt at rutuni á Sandi, so óivað fáa bæði Torkil Veyhe og Hafsteinn Ægir Geirsson sítt at síggja til.

Kappingin heima á Sandi byrjar í dag klokkan 13, og súkklað verður frá Statoilstøðini inn í Traðardal og heimaftur, og síðani yvir um brúnna á Sandafløttinum og aftur til Statoilstøðina. Teinurin skal koyrast tilsamans tríggjar ferðir, áðrenn komið verður á mál.

## Rætting

Av misgáum skrivaðu vit í gjár, at allir tríggir súkklararnir á einum liði skulu gjøgnumføra, fyri at úrslitið hjá liðnum skal telja við. Hetta er skeivt, tí av tí at tað bert eru úrslitini hjá tveimum teimum fremstu á hvørjum liði, sum eru avgerandi, ávirkar tað ikki liðkappingina, um tann triði gjøgnumførur ella ikki. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.
hil